# Venjingar-uppgáva 6

Finn grundlið, umsøgn og møguligt ávirki og set komma.

Hanus og Svanna ótu fisk til døgurða.

Rósa keypir ís í kioskini.

Mamma sá súkkluna sum drongurin átti.

Tá ið sólin skínur eta vit ís og drekka saft.

Vit gingu túr í góðveðrinum.

Hanus etur køkur og Malan drekkur sodavatn.

Mamma vaskar bil og babba heingir klæðir á snórin.

Spælir tú fótbólt? Eg spæli fótbólt við U-12.

Eg fái mær kjøt upp á breyð og drekki eitt glas av mjólk afturvið

Eg siti og skrivi bræv til ommu meðan mamma loysir krossorðagátur.

Finn grundlið, umsøgn og møguligt ávirki og set komma.

# Venjingar-uppgáva 6.1

Fólkini í bygdini bygdu kassabilar til børnini.

Elisa og Jóhannes áttu eitt fitt heimalamb og Vár átti ein fittan hundahvølp.

Mamma og eg ganga túr meðan pápi og Eir fiska.

Eir fekk ein tosk og babba fekk eina hýsu.

Vit gjørdu allan fiskin til frikadellur.

Anna hoppar band og Jónas byggir putlispæl.

Vit vunnu dystin.

Drongurin át ísin sum hann fekk frá abbanum.

Gásin verjir ungar sínar.

Vit eiga 10 dunnur so vit fáa 10 egg hvønn dag.

Mær dámar væl dunnuegg men beiggi mín etur heldur høsnaregg.